Jesus er ljósið, sum kom inn í myrka heimin

„Eg eri ljós heimsins. Tann, sum fylgir mær, skal ikki ganga í myrkrinum, men hava lívsins ljós."

Jóhannes 8,12

Menniskjuni eru ljós

„Tit eru ljós heimsins. Ikki kann tann staður verða fjaldur, ið er uppi á fjøllum. Ikki heldur kveikja tey ljós og seta tað inn undir skeppumálið, men í ljósastakan; tá lýsir tað fyri øllum, ið inni eru í húsinum. Soleiðis lýsi ljós tykkara fyri fólki, at tey mega síggja góðgerðir tykkara og æra faðir tykkara, sum er á himni."

Matteus 5,14-16

Orð Guds er ljós

„Títt orð er ein lykt fyri fóti mínum, eitt ljós á gøtu míni."

Sálmur 119,105

„Opinbering orða tína íbirtir ljós, ger teir óroyndu vísar."

Sálmur 119,130